Terji Nielsen 18.01.2007 - 10:40

# Amin keypti sær eina Harley í Føroyum

**Danski skemtarin Amin Jensen hevur júst vitjað í Føroyum í sambandi við Ársins Handil, og hann nýtti høvi at keypa sær eina Harley Davidson í Føroyum.**



Meðan Amin Jensen var í Føroyum, búði hann hjá sínum góða vini Jákup Jacobsen í Havn, sum sjálvur nýligani hevur keypt sær eina Harley Davidson. Teir báðir fóru ein túr yvir Harley Davidson Føroyar í Havn at hyggja eftir nýggju motorsúkkluni hjá Jákupi. Samstundis vildi Jákup eisini vísa Amin eina Harley Davidson Duo Glider frá 1962, ið stóð til sølu í handlinum.

Kærleiki við fyrsta eygnabrá

Tá ið Amin Jensen sá Duo Glider súkkluna, var tað kærleiki við fyrsta eygnabrá. Hann mátti bara hava súkkluna, men Ove Ritter, ið hevur handilin hjá Harley Davidson í Føroyum, segði, at ein annar dani var júst komin til Føroya at hyggja eftir súkkluni, og hesin hevði fyrstarætt at keypa.

- Av hesi orsøk slapp Amin ikki at keypa súkkluna beinanvegin, men sama dag, sum Amin skuldi av landinum aftur, ringdi Ove Ritter til mín og segði, at danski keyparin ikki kundi taka støðu til, um hann skuldi keypa súkkluna, og tí fekk Amin møguleikan, og hann smekkaði til beinanvegin, greiðir Jákup Jacobsen frá.

Amin Jensen hevur áður átt motorsúkklu, og hann hevur koyrikort til øll sløg av akførum. Nú hann hevur keypt motorsúkklu í Føroyum, er avtala gjørd við Ova Ritter um, at súkklan verður latin Amin á donskum plátum í Danmark. Jákup Jacobsen greiðir frá, at tað ikki er ætlanin hjá Amin, at súkklan bert skal standa til pynt, tí hann vil fegin brúka hana.

- Hon kemur at standa á skrivstovuni hjá honum heima við hús. Hann hevur gjørt sær eina stovu um til eina stóra skrivstovu, og har kemur súkklan at standa, greiðir Jákup frá.

Motorsúkklufjepparar í Føroyum eru sera virknir, og nú eru teir í Harley felagnum í Føroyum farnir undir at fyrireika eina "bikara-veitslu" fyri allar motorsúkklufjepparar í landinum, har ætlanin er at fáa okkurt stórt føroyskt navn at spæla.